– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Stór, góð og væl bygd hús á Argjum

**Úti í nýggja býlinginum á Hamaranum á Argjum standa hesi rúmligu, liviligu og arkitektteknaðu húsini við frálíkum útsýni yvir Havnina, fjørðin og fjøllini norðanfyri.**









## Fyrsta fatanin

Tú koyrir út á Argir niðan í nýggja og hugnaliga býlingin á Hamaranum og ert í bygdum øki, men náttúran liggur vøkur og friðarlig beint uttan fyri dyrnar við vegin út á Glyvursnes. Útsýnið úr stovuni yvir Havnina, fjørðin og fjøllini norðanfyri er heilt einastandandi. Tú koyrir inn í snøgga túnið við stórari garagu og kanst ganga so gott sum turrskøddur inn í húsini. Dámligu húsini eru opin og innbjóðandi at koma til, men giringin ger, at tú kanst vera fullkomuliga í friði inni hjá tær sjálvum.

## Uttanfyri og uttanum

Húsini standa væl fyri í mun til sólargang, ljós og luft. Sera snøggur garður er uttanum. Aftanfyri húsini er sera snøgt útigólv / terassu, ið vendir ímóti sólini, so tú kanst njóta góðu løturnar allan dagin, og fáa sól og ljós samstundis sum tú kanst fáa lívd og le fyri lotinum. Alt er gjørt heilt liðugt við betonkantum og giring, asfalti og flísum, og dentur er lagdur á, at alt skal vera so viðlíkahaldsfrítt sum gjørligt. Húsini standa í góðum grannalagi í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnur, nýggi skúlin og busssamband er nær við.

## Stílur og snið

Inni er stílurin lættur og ljósur, men ber eisini brá av tyngd og dygd við tað, at gólv, loft og hurðar eru úr træ. Alt er sera snotiligt og sera væl hildið. Húsini eru gjørd úr góðum tilfari við sera góðum handverki. Stílurin er ljósur og opin, og stóra stovan er opin upp í tróðrið og sýnist rúmsátt og glæsilig, men eisini hugnalig og fjálg við vakra og væl virkandi brenniovninum. Húsini eru so væl bygd og hildin, at tey at kalla eru so góð sum nýggj.

## Ljós og luft – inni og úti

Stóru vindeyguni geva nógv ljós inn í rúmini og frálíkt útsýni út, men tey eru býtt upp við tvørsprossum, so tey undirstrika arkitekturin og prýða húsini, og sjálvt um tú sært væl út og hevur samband við umhvørvið uttanfyri, kanst tú væl og virðiliga vera ósædd/ur og í friði inni hjá tær sjálvum. Hurð er úr stovuni út á terassuna norðureftir, so tú kanst fáa ljós og luft, tá ið tú vilt og njóta einastandandi útsýnið, og hurð er úr gongini og út á terassuna suðureftir, sum gevur tær eitt gott samband millum úti og inni.

## Innrætting

Í miðhæddini er felagsøki til alla familjuna. Har er inngongd durur, wc, trappugongd / gongd / hall / garderoba, køkur, borðsstova / stova við útgongd til altan / terassu, hjúnarrúm, 2 kømur og baðirúmi við bæði brúsu og baðikari. Í gongini er opin trappa upp til ovastu hædd, har ein stór huga-, ítrivs- og sjónvarpsstova er, ið kann býtast upp í fleiri rúm, um tørvur er á tí. Í niðastu hædd er inngongd, durur, trappugongd, stórt kamar, vaskirúm / bryggers, ítrivsrúm, goymslurúm, og stórt fýrrúm / kjallararúm við egnari inngongd, ið væl kann innrættast, so niðara hædd verður ein sjálvstøðug íbúð, um tørvur er til tess. Her kunnu húsfólk í øllum aldrum og við mongum ymiskum áhugamálum liva og trívast.

## Fakta

Adressa: ............Viðargøta 58, Argir
Byggiár: .............1993
Hæddir:...............3
Gólvvídd:............310 m2
Grundøki:............500 m2
Hjallur: ................Ja
Bilhús:.................28 m2
Prísuppskot: ......kr. 2.500.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**